# ítróttur

Nr. 188 • mikudagur • 2. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


# Tveir vinstrabeintir fingu sekkin


*Saman við Øssi Hansen er Helgi L. Petersen sloppin inn aftur í landsliðshitan*

**Umframt Øssur Hansen er Helgi L. Petersen nýggjur á landsliðnum. Tað hevur við sær, at Sjúrður Jacobsen og Heðin á Lakjuni ikki verða í ferðalagnum til Litavia og Týskalands**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Ivaleyst fer ferðin, sum landsliðið fer undir mikudagin í komandi viku, altíð at standa sera frammarlaga í huganum á spælarunum, sum fara við. Ikki so nógv av ferðini til Litavia. Har var landsliðið fyri fýra árum síðani, og burtursæð frá málleysa javnleikinum leygardagin 10. oktober í 1998 var tann ferðin einki serstakt upplivilsi.

Heldur er tað ferðin til Týskalands, sum man tykjast spennandi. Tað verður ikki á hvørjum ári, at føroyingar fara at spæla ímóti teimum, sum bara fyri einum stórum fjórðingsári síðani vóru annar parturin í finaluni um heimsmeistaraheitið.

Tveir spælarar, sum vóru á átjan manna liðnum í 2–2 javnleikinum ímóti Skotlandi, fáa ikki boð til spennandi uttanlandsferðina. Talan er um Sjúrð Jacobsen og Heðin á Lakjuni. Teir eru báðir vinstrabeintir, og hesa ferð hevur landsliðsvenjarin gjørt av, at teir skulu vera eftir í Føroyum. Øssur Hansen hevur fingið annað plássið, og Helgi L. Petersen hevur fingið hitt plássið.

At Øssur aftur skuldi fáa landsliðsboð var greitt longu fyrrapartin mánamorgunin. Harfturímóti er tað meiri óvæntað, at Helgi L. Petersen aftur er í landsliðshitanum. Hann var millum teir mest eyðsýndu NSÍ menninar sunnudagin, tá Henrik Larsen var í Runavík og hugdi at dystinum millum NSÍ og B68. Men Helgi var ikki so eyðsýndur, sum hann var fyrr í summar.

Tá Føroyar og Liktinstein spældu, var Helgi sera eyðsýndur ta løtuna, sum hann var á vøllinum. Men tá varð hann skaddur, og nú tykist venjarin vilja veita framrættaða NSÍ miðvallaranum eitt nýtt høvi at prógva, at hann eigur at vera natúrligur partur av landsliðnum.

### Teir útvaldu

Teir, sum nú hava fingið boð frá FSF um, at landsliðsvenjarin vil hava teir við til Litavia og Týskalands eru Jákup Mikkelsen, Molde, Jens Martin Knudsen, NSÍ, Óli Johannesen, TB, Hans Fróði Hansen, B68, Pól Thorsteinsson, NSÍ, Jón Rói Jacobsen, HB, Jóhannis Joensen, HB, Jens Kristian Hansen, B36, Øssur Hansen, B68, Fróði Benjaminsen, B68, Julian Johnsson, B36, Jákup á Borg, B36, Rógvi Jacobsen, HB, Hjalgrím Elttør, KÍ, Helgi L. Petersen, NSÍ, John Petersen, B36, Christian Høgni Jacobsen, Vejle og Andrew av Fløtum, HB.

Landsliðið fer úr Vágum mikudagin. Henrik Larsen, Jákup Mikkelsen og Christian Høgni Jacobsen fara umvegis Keypmannahavn og til Litavia.


*Sjúrður Jacobsen úr NSÍ noyhðist fyri fyrst at lata landsliðssessin frá sær*


*At Øssur er tikin innaftur, hevur helst gjørt sítt til, at Heðin á Lakjuni ikki sleppur við landsliðnum hesaferð*



# Dreingirnir taptu stórt í Bukarest

**Venjarin heldur ikki, at hann kann lasta spælarunum fyri, at teir ikki royndu tað, sum teir kundu, tá teir taptu 8–0 ímóti Rumenia**

U-17 EM UNDANKAPPING
*Jóannes Hansen*


*Føroyska U-17 landsliðið er her á veg inn á vøllin í NM-kappingini, sum herfyri varð hildin í Umeå í Svøríki*

Bill Jacobsen, venjari hjá u-17 landsliðnum, hevur síðani í fyrrakvøldið havt ein stóran setning. Hesin hevur verið at royna at lyfta føroyska liðið, sum er í rumenska høvuðsstaðnum Bukarest, upp og harvið at fyrireika teir til næstu uppgávuna, sum er á skránni í kvøld. Tá skal føroyska liðið spæla ímóti Eysturríki.

At uppgávan hjá venjaranum og spælarunum er stór, er einki at ivast í. Teir vóru í sonnum ódnarveðrið mánakvøldið, og sárini, sum teir fingu ímóti rumensku vertunum, er tað ikki bara sum at siga tað at lekja.

Rumenia vann 8–0, eftir at teir í fyrra umfarinum høvdu verið frammanfyri 2–0. Málini í 1. hálvleiki komu í 16. og 31. minutti. Hvør hálvleikurin er 40 minuttir, og eftir steðgin skoraði Rumenia í 50., 52., 57., 59., 60. og 63. minutti.

Føroyska liðið legði fyri í 1–4–4–1 uppstilling, men tá fyrra umfarið var næstan liðugt, løgdu teir um til meiri 4–4–2. Tað gekk als ikki, og síðstu tjúgu minuttirnar løgdu teir um aftur til tað, sum teir vóru byrjaðir við.

– Vit vórðu regulert avhølvaðir. Tá vit í summar vóru við í NM kappingini í Svøríki taptu vit 4–0 bæði ímóti Noregi og Onglandi. Serliga Ongland spældi væl. Men teir vóru ikki á tí støði, sum Rumenia vísti mánakvøldið, sigur Bill Jacobsen úr Bukarest.

– Teir spældu typiskt eystureuropeiskt. Teir vóru góðir við bóltinum, og teir spældu bóltin skjótt ímillum sín.

Men tølini boða ikki frá, at avrikð hjá tínum monnum hevur verið nakað serligt?

– Fyrstu lítlu løtuna sá tað ikki so illa út. Páll M. Joensen var einsamallur á toppinum. Tvær ferðir fór hann sjálvur og hevði góðar royndir. Eftir at teir høvdu skorað málini í 1. hálvleiki tóktist tað, sum um okkara fótaðu sær leikliga. Tá broyttu vit til 4–4–2. Men gongdin fyrrapartin av seinna umfarinum vísti, at tað vóru vit ikki førir fyri. Tað gjørdist alt ov tunnt í verjuni, og mótstøðumenninir komu aftur og aftur ígjøgnum á miðásinum. Hugburðinum bilti einki, men bitin var alt ov stórur.

Bill Jacobsen sigur, at tað kom stak illa við, tá verjuálitið, Poul N. Poulsen úr VB, mikukvøldið varð so mikið illa skaddur, at hann ikki kundi fara við til Rumenia. Í síðsta landskappingardystinum, sum meistararnir úr VB spældu ímóti HB – havnarmenninir vunnu 5–1 – varð Poul knæskaddur. Teir vóru bangnir fyri, at talan var um liðbandsskaða.

### Nýggjar avbjóðingar

Í kvøld fer føroyska liðið at spæla ímóti Eysturríki, og fríggjadagin verður mótstøðuliðið Makedonia. Mánakvøldið vann Eysturríki 2–0 ímóti Makedonia,

– Vit sóu ein part av tí dystinum, og vit fingu staðfest, at tað verður torført mikukvøldið. Makedonia tykist ikki at vera eins væl fyri, sum hini bæði liðini eru. Men avbjóðingin verður heilt víst sera stór hjá okkum, heldur venjarin.

Føroyska liðið sá soleiðis út mánakvøldið ímóti Rumenia: Gunnar Nielsen, Frem – Fritleif í Lambanum, ÍF – Allan Tungá, OB (Steffan Kalsø, KÍ, 38.), Jústinus H. Hansen, NSÍ (Borgar Kristiansen, Skála, 66.), Jónas Þór Næs, Frem, Svenn D. Jacobsen, HB (Jón Jacobsen, KÍ, 66.) – Bogi Hermansen, Frem, Emil Nolsøe Leifsson, liðformaður, Frem, Mikkjal T. Hentze, B71, Ovi Magnussen, B68 – Páll M. Joensen, HB.

Tað er rættuligt heystarveður í Bukarest – vindur, regn og hitastigini eru ikki fleiri enn fimm.

# NSÍ og B68 spæla í kvøld

**Longu leygardagin verður greitt, um tað verður NSÍ ella B68, sum komandi kappingarár skal eiga rættin at spæla í næstbestu deildini**

ENDASPÆL
*Jóannes Hansen*

Burtursæð frá í 1. deild eru allar landskappingarnar liðugt spældar. Men tað ber ikki enn til hjá øllum teimum, sum hava verið við í landskappingunum, at sleppa øllum fótbóltshugsanunum og í staðin bara at hugsa um og brúka tíðina til fjall og fletting.

Endaspæl eru á skránni, og fyrsti dysturin verður longu í kvøld. Tá skal NSÍ, sum endaði næstaaftast í 2. deild, á heimavølli spæla ímóti B68, sum endaði næstovast í 3. deild. Seinni dysturin verður á Svangaskarði leygardagin, áðrenn B68 í 1. deild fær vitjan av Skála.

B68 tryggjaði sær silvurmerkini í 3. deild leygardagin. Teir vóru í Vágum og vunnu 4–2. Superveteranurin Aksel Højgaard skoraði øll fýra málini. Eftir venjaraskiftið á Toftum hevur Aksel havt ábyrgdina av liðnum í 3. deild. Hann hevur spælt í 3. deild alt kappingarárið, og tað kann ikki sigast annað, enn at hann rættuliga kendi sína ábyrgd leygardagin.

NSÍ var við sínum 2. deildarliði í Sumba leygardagin. Teir megnaðu málleysan javnleik, og harvið komu teir undan beinleiðis niðurflytingini, sum teir undan leygardegnum høvdu møguleika at koma í. At HB tapti í Klaksvík hevði við sær, at NSÍ hevði sloppið undan beinleiðis niðurflytingini, sjálvt um teir einki høvdu fingið í Sumba.

### Næstu leygardagarnar

Umframt endaspælið um eitt pláss í 2. deild eru eisini endaspøl á skránni um pláss í 1. og 3. deild. Tað er greitt, at B71, sum vann silvur í 2. deild, verður annar parturin í stríðnum um eitt pláss í bestu deildini. Tað er ikki heilt greitt enn, hvat hitt liðið verður. Tað verður avgjørt leygardagin. Alt bendir á, at tað verður Skála, sum skal spæla ímóti B71. Men í teoriini ber tað til hjá Skála at sleppa framum EB/Streym. Leygardagin skal 1. deildarliðið hjá Skála spæla á útivølli ímóti B68, og EB/Streymur skal spæla á heimavølli ímóti GÍ.

Virgar Hvidbro á FSF skrivstovuni, sum saman við kappingarnevndini hevur havt við lands– og steypakappingarnar at gera, sigur, at tað ikki er greitt enn, nær dystirnir um plássið í 1. deild fara at verða spældir, men at tað ivaleyst er mest sannlíkt, at teir verða spældir tvey tey næstu vikuskiftini, eftir at landskappingin í 1. deild er liðugt spæld.

AB vann 3. deild, og teir hava harvið tryggjað sær pláss í næstbestu deildini. HB hevur tikið sítt lið úr 3. deild. Tí verður eingin onnur beinleiðis niðurflyting úr 3. deild. Skála vann 4. deild, og tí flyta teir beinleiðis upp í 3. deild. B71 endaði næstaftast í 3. deild, og tí verða teir annar parturin í endaspæli um rættin at taka lut í 3. deild. Mótstøðuliðið hjá teimum verður EB/Streymur, sum tapti finaluna í 4. deild ímóti Skála. Fyrri dysturin millum B71 og EB/Streym verður á Sandi nú leygardagin, og seinni dysturin verður á Eiði annan leygardag.

# Yngru deildirnar skulu nú spæla um steypini

**Dreingirnir og gentur 14–17 ár fara at spæla annan leygardag, meðan smágenturnar og smádreingirnir fara at spæla nú leygardagin**

STEYPAKAPPINGAR
*Jóannes Hansen*

Nú er skráin løgd fyri, hvussu steypakappingarnar í yngru fótbóltsdeildunum skulu avgreiðast. Sambært kappingarskipanini skuldu allar steypakappingarnar havt verið liðugt spældar undan summarsteðginum. Men orsaka av verkfallinum kom ólag í fótbóltsárið, og so gjørdi kappingarnevndin hjá FSF av, at kappingarnar skuldu útsetast inntil landskappingarnar vóru liðugt spældar.

Talan er um steypakappingarnar í dreingjadeildini, smádreingjadeildini, gentur 14–17 ár og smágentudeildini.

### Tey yngru

Smádreingirnir og smágenturnar skulu sambært nýggju skránni spæla nú leygardagin.

Smádreingirnir skulu spæla í trimum bólkum í høvuðsstaðnum. Seinni sama dag skulu teir tríggir bólkavinnararnir spæla finaluumfar á Argjum. Allir dystirnir verða tvær ferðir fimtan minuttir.

Í bólki A, sum fer at spæla á Argjum, eru AB, EB/Streymur og KÍ. Í bólki B, sum fer at spæla í Gundadali, eru B68, HB og VB, og í bólki C, sum eisini fer at spæla í Gundadali, eru B36, B71 og NSÍ. Í fjør vann HB Cadbury steypið.

Smágenturnar skulu spæla á Toftum og í Runavík. A bólkurin fer at spæla í Runavík, og í honum eru B36, EB/Streymur, HB, NSÍ og VB. Í B bólkinum, sum fer at halda til á Svangaskarði, skulu spæla B68, B71, ÍF og KÍ.

Finaluumfarið verður í Runavík. Tá skulu bestu liðini í teimum báðum bólkunum dystast um fyrsta plássið, og næstbestu liðini skulu spæla um triðja plássið. Hvør dysturin verður tvær ferðir tíggju minuttir. Í fjør vann HB Niels L. Arge steypið.

### Tey eldru

Dreingirnir og gentur 14–17 ár fara at spæla annan leygardag.

Dreingjakappingin verður í Vágum. Í A bólkinum, sum verður avgreiddur í Sørvági, verða luttakararnir B36, B68, KÍ og SÍ/SÍF. Í B bólkinum, sum verður í Sandavági, verða luttakararnir B71, TB og VB, og í Miðvági, har tað verður spælt í C bólkinum, verða luttakararnir HB, ÍF og NSÍ.

Finaluumfarið millum teir tríggjar bólkavinnararnar verður í Sørvági. Allir dystirnir vera tvær ferðir fimtan minuttir. Í fjør vann HB Koyriskúlasteypið.

Gentur 14–17 ár fara at dystast í Vági. Har verður hvør dysturin tvær ferðir tíggju minuttir, og allir teir fimm luttakararnir skulu spæla ímóti øllum hinum. Feløgini, sum hava boðað frá luttøku, eru AB, B36, EB/Streymur, HB og VB. Í fjør vann HB Mótasteypið.